# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Sjúrður Sivertsen 65 ár

Fríggjadagin 29. apríl 2005 fyllir Sjúrður Sivertsen í Havn 65 ár.

Sjúrður er havnarmaður. Foreldrini vóru Helena, vanliga nevnd Tulla, úr Havn, og Júst Sivertsen, úr Havn, sum saman við Johs. Olsen, influtti tann fyrsta bilin í Føroyum í 1922.

Sjúrður hevur livað alt sítt lív í einum bilumhvørvi. Hann fór sum ungur í snikkaralæru, men hugurin var størri til bilarnar, og hann kom at arbeiða saman við pápa sínum í teirra egnu flutningsfyritøku, sum hevði lastbilar og hýruvogn.

Sjúrður tók yvir fyritøkuna eftir at pápan doyði í 1970, og við hegni og arbeiðssemi arbeiddi hann fyritøkuna upp til eina av teimum størstu flutningsfyritøkunum í landinum. Tá fyritøkan var upp á tað størsta, vóru bilarnir umleið 40 í tali, og tey høvdu nógv fólk í arbeiði.

Umstøðurnar hava ikki altíð verið av teimum bestu. Áðrenn fyritøkan fekk egnan virkisbygning í 80-unum, vórðu allar umvælingarnar av lastbilunum



gjørdar úti, á Skálatrøð í Vágsbotni og aðrastaðni.

Sjúrður er kendur fyri at duga sera væl at arbeiða, bæði at umvæla bilarnar og at arbeiða við teimum, sum t.d. arbeiði við krana og at taka bilar upp, sum eru farnir út av koyrivegnum.

Sjúrður er giftur Eyðhild, f. Djurhuus, ættað av Selatrað, og tey eiga fýra børn: Júst, Jógvan, og Hans, sum allir búgva í Hoyvík, og Lenu, sum býr í Íslandi. Eyðhild og Sjúrður eiga 12 barnabørn.

Í sambandi við føðingardagin verður vælkomt í Pálsstovu leygardagin 30. apríl frá kl. 12-18, har øll eru vælkomin.

---

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hassi Kragesteen,**
**Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum mikumorgunin 27. apríl 82 ára gamal.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum, fríggjadagin kl.18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 30. apríl kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Anna og Borgarhjørt**

---

## Til minnis um
# Olgu Poulsen
**f. 16.04.27 - d. 09.06.04**
**og**
# Jógvan Poulsen
**f. 13.07.26 - d. 04.10.04**

Nú eru nakrir mánaðir farnir, síðan tit løgdu árarnar inn. Tit fingu eitt langt lív saman og náddu at halda gullbrúdleyp.

Sum ungur var Jógvan sjómaður. Hann fiskaði, sum so mangur, undir Íslandi. Seinni fór hann á garnavirkið á Oyri at arbeiða, og seinastu arbeiðsárini var hann húsasmiður. Jógvan var ógvuliga vælgerin og fekk alt at bera til. Olgamostir var húsmóðir og arbeiddi eisini í nógv ár á garnavirkinum og á skelja- og rækjuvirkinum á Oyri.

Nú tit vóru farin at eldast, fekk Jógvan staðfest álvarsliga sjúku, men hóast tað, so gekk tað hampiliga væl. Olgamostir gjørdi alt fyri at lætta í tí dagliga og hevði stóra umsorgan fyri manninum. Tey vóru altíð saman og vóru so góð við hvørt annað. Lívið var virðismikið og hvør dagur ein gáva. Men Harrans vegir eru ikki okkara, og áðrenn nakar vardi tað, varð Olgamostir brádliga tikin burtur.

Mær untist at vera saman við teimum báðum hesa seinastu løtuna. Vit sótu og hugnaðu okkum við gomlum myndum og prátaðu um tað, sum farið var. Sum altíð, hevði eg eina kenslu av, at hesar løtur høvdu stóran týdning fyri tey, og kendi meg so hjartaliga vælkomna. Sum vit soleiðis sótu í friði og náðum, vórðu boð eftir Olgumostur, og eftir bert lítlari løtu, var hon ikki ímillum okkara longur.

Hetta var ein harður smeitur hjá Jógvani og familjuni, og ikki minst nú tit bæði, Sanna og Jóan Pauli, vóru farin at stákast til brúðleyp.

Eftir at Olgamostir var farin, gjørdist Jógvan alt meira sjúkur, og hugurin at liva var ikki hin sami, nú konan var farin. Men Jógvan dugdi óvanliga væl at bera bæði sorg og sjúku, og hann var tolin og nærverandi til tað seinasta. Tað var týðiligt at hann hvíldi í Harrans lyftum, og at alt var lættari at bera, nú Olgamostir bíðaði honum hinumegin.

Olgamostir og Jógvan fingu tvær døtur, Jonhild og Sannu. Sum børn vóru systkinabarnið Sigtór og eg nógv hjá Olgumostur og vitjaðu, og vit plagdu at skiftast um at sova har okkurt vikuskifti. Hetta komst av, at Jonhild var einabarn í 10 ár. Langt var ímillum húsini, og foreldrini vildu fegin, at Jonhild hevði børn at spæla við.

Hjá Olgumostur og Jógvani var altíð fjálgt og gott at vera, og vit hava nógv góð minni frá barnaárunum. Millum annað, tá ið tú, Jonhild fekst eina lítlasystur. Hetta var ein stórur dagur, og vit gleddust saman við tykkum.

Sum tíðin leið vaks lítla Sanna, og hon var so fitt og vøkur sum ein eingil. Hárið var livandi og so sítt, at tað fjaldi hana. Tað besta eg visti var at hyggja, tá ið Olgamostir greiddi hárið og flættaði tær longu flætturnar.

Olgamostir dugdi væl til hendurnar og seymaði nógv. Einaferð, tá ið eg var smágenta, seymaði hon mær eina dukku. Høvdið hevði hon keypt, men kroppin seymaði hon. Eg sat sum steinrunnin og hugdi at, hvussu hon tilevnaði dukkuna við SINGER seymimaskinuni. Á, sum eg var glað fyri dukkuna og ikki minst tí, at hon júst seymaði hana til mín.

Olgamostir var blíð, og altíð átti hon ein heimabakaðan køkubita, komst tú at vitja. Henni dámdi væl at ganga á bingo, og tað var lívligt og stuttligt, har sum hon var. Jógvan var meira friðarligur og dámdi væl at sita fyri vindeyganum og hyggja út á fjørðin. Hann var gløggur og fylgdi væl við bæði í tí, sum hendi rundan um hann, og úti í heimi.

Olgamostir og Jógvan høvdu tíð at liva og at vera nakað fyri børn, barnabørn og langommu- og langabbabørn, og heimið var altíð ein trygg havn at koma í.

Nú er tómligt, og tit sita spyrjandi eftir, hví alt skuldi ganga so skjótt. Men tá ið á stóð, vóru tit har og troystaðu og hjálptu. Tað var so vakurt, Jonhild, tá ið tú setti alt til síðis og flutti inn at vera um pápan ta seinastu tíðina. Men lívið má ganga sína gongd, og eitt er vist, at foreldur tykkara ynsktu einki meir, enn at tit skuldu hava tað gott og verða glað. Tað vistu tit eisini, og tí fóru tit aftur at fyrireika brúdleypið, Sanna og Jóan Pauli.

Eg fari at takka tykkum báðum fyri, at vit fingu høvið at gleðast saman við tykkum henda merkisdag. Tit vóru so vøkur og eydnusom, har tit sótu saman við børnunum. Jóan Pauli, tú hevur fingið eina stillføra konu við nógvum góðum dygdum. At vaksa upp í einum góðum og tryggum heimi er gull vert. Tað góða, sum vit hava upplivað, fylgir og ber okkum gjøgnum lívið, og vit føra tað víðari til okkara eftirkomarar.

Góða Jonhild og Sanna við familjum, má Harrin styrkja og hjálpa tykkum framyvir.

Heilsan

**Sólgerð**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi og verpápi

**Napoleon Nolsøe**
**vanliga nevndur Poli, Trongisvágur**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Ólavur Rasmussen, prest og til Poul Færø.
Takk til kirkjutænarar og sangarar.
Takk til starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi og til starvsfólkið á Hotel Tórshavn.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Hotel Tórshavn og takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Allan, Páll og Andras**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum sum sýndu okkum samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Olina Olsen**
**Skopun**

andaðist og varð borin til hvíldar.
Takk til Jógvan Lamhauge, Elin Jakobsen og Jákup R. Hansen prest, fyri vøkur og troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni.
Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og Finnleif Fagradal.
Takk øll tit, sum á ymiskan hátt hjálptu til við ervið.
Takk fyri kransar, blómur og gávur til Missiónshúsið.
Takk øll tit, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.
*Heilsan við Johs. 5,24.*

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini v/ fam.**